# Engagement við avmarkingum í huga

TÓRA VIÐ KELDU



Seinastu tíðina hevur kjakið um stressaðu lærararnar í fólkaskúlanum fingið ávíst pláss í fjølmiðlunum. Hugt verður at skúlanum, og ymisk eru tey, sum siga sína hugsan um, hvaðani strongdin stavar, og hvar manglar eru í skipanini. Uttan nakra endaliga niðurstøðu ella loysn verður strongdin tó staðfest. Fleiri lærarar eru av somu orsøk ikki førir fyri at røkja starvið til fullnar.

**Varpa læraran**

At lýsa ein lærara í dagsins fólkaskúla átti at verið ein løtt uppgáva. Lærarin er nærlagdur, fakliga sterkur og til staðar - bæði likamliga og sálarliga. Hann er førur fyri at skapa góðar fólkaræðisligar reglur fyri spæli og øðrum, sum næmingarnir gera í skúlanum. Tímatalvan vísir honum nær og hvar, og pensum í ymisku lærugrein sigur honum hvat - tó hevur hann, innan fyri hesar karmar, frælsi til sjálvur at leggja undirvísingina tilrættis. Hvønn tíma, sum varar 45 minuttir, skal hann røkja teir 24-28 næmingarnar, sum sita í skúlastovuni. Allir hava teir ymiskan tørv og eru sosialt og fakligt á ymiskum støði. Hendan trupulleikan skal hann loysa við at taka støði í hvørjum einstøkum næmingi - tað sum á góðum námsfrøðiligum máli verður kallað at differentiera. Inni í flokkunum fær hann næmingarnar at arbeiða og síggja stórt í tí, teir gera. Fólk siga jú, at næmingarnir gerast nærlagdir og arbeiðssamir, tí teir hava ein lærara, sum kveikir.

Av 45.000 føroyingum eru einir 700 lærarar - ein rættiliga stórur samfelagsbólkur, sum eg haldi, avgjørt skal hava evni langt út um alla rímiligheit og hevur eina arbeiðsbyrðu, sum er krevjandi út um alt mark. Tað sýnist, sum eru her ongar avmarkingar. Um fólk hava hetta álitið á fólkaskúlalærarunum, er hetta samfelagsbólkurin, sum fram um allar átti at fingið hægstu tign og bestu hugsandi karmar.

**Vørpan flutt**

Um vit nú flyta vørpuna av læraranum og yvir á onnur, sum standa uttan fyri skúlan og fáa tey at lýsa dagsins lærara, eri eg vís í, at vit fáa eina heilt aðra lýsing enn hesa, eg her geri. Fólk hava sína egnu hugsan um læraran og eru ikki smæðin at siga hana - heldur ikki um børnini hoyra. Viðmerkingar sum: lærarar hava alt ov nógva frítíð, teir arbeiða bara hálvan dag, teir bara grenja ella gera ov lítið, eru kendar.

Um tú nóg ofta hoyrir virðisleysar viðmerkingar, eitt nú at tú ikki ert nóg góður ella dugnaligur, so fert tú umsíðir at trúgva tí. Soleiðis gongur tað við sálarligum ágangi. Sjálvandi hevur egna sjálvsvirðingin hjá lærarum nógv at siga, og hetta merkir heldur ikki, at lærararnir eru frítiknir ábygd. Men um lærarin skal vera skapandi og virkin, eru nakra avgjørdar fortreytir - tær liggja tí í lærаranum sjálvum, men sanniliga eisini sum vælvild, stuðul og undirtøka uttan fyri skúlagátt.

Eg eri rødd fyri, at tað mangan eru fólk, sum standa uttan fyri skúlan, sum skapa eina skeiva mynd av læraranum. Eg veit, at tað eru mong, sum virða ein lærara, tó kemur tað alt ov ofta fyri, at lærarar ikki fáa ta virðing, teir eiga, og sum sjálvsagt gevur lærarum tiltrongda sjálvsálitið. Serliga tá hugsað verður um arbeiðsbyrðuna og ábyrgdina. Eg veit av royndum, at tað er eitt ótal av dugnaligum og nærlagdum lærarum í Føroyum, tað er tí syrgiligt, at fleiri ikki trívast og tí heldur ikki støðast.

**Engagement**

Fór ein dagin at leita eftir orðinum engagement í orðabókini. Leitaði eina løtu, men sá skjótt, at orðið verður ikki heilt dekkað av nøkrum einstøkum føroyskum orði. Tí fór eg at spyrja, um engagement ikki er serliga sjónligur partur av heimligu føroysku mentanini. Sjálvandi vita vit, hvat liggur í orðinum, men um vit ikki eiga orðið á reinum føroyskum, hvussu skulu vit so á skilagóðan hátt flætta tað inn í mentanina. Her hugsi eg samfelagið sum heild.

Hava vit hug at taka lut, vera virkin, íðin, liva okkum inn í ella binda okkum til, gera eitt arbeiði frálíka væl, siga okkara meining í góðum lívligum kjakast, vilja vit hava ávirkan, gera mun ella vera hugfangað? Hesir eginleikar liggja allir í hesum eina orðinum, hetta saman við eini realistiskari mynd av, hvørjar avmarkingar liggja í skipanini og okkum sjálvum.

Vit duga í ítrótti og tónleikurin blómar – men hvussu er innan grundleggjandi læring og útbúgving? Eg havi hug at halda, at her detta vit av vogninum. Hvussu nógv tíð og orka verður løgd í skúlaviðurskifti, og hvørji ítøkilig mál og ynskir verða sett av foreldrunum fyri børnini, sum stóran part av degnum verða kallað næmingar.

Eg síggi stórt í teimum, sum hava eina meining og fleiri eru tey, sum geva teirra meining til kennar, men spurningurin er, hvat vit vilja, og um hon kann brúkast til nakað, um vit ikki kenna egnar avmarkingar, og um hon ikki verður søgd á røttum stað og í rættari tíð. Her haltar kanska - bæði inn og uttan fyri skúlagátt. Kritikkur uttan at vilja loysnir, er betri køvdur.

**Avmarkingarnar**

Á heimasíðuni politikken. dk stóð grein, sum varpaði ljós á læraran. Bæði engagement, avmarkingar og strongd vóru evnini í nýggjari kanning, sum týski granskarin Udo Rauin, og líknandi donskum kanningum, sum Mads Hermansen professarin á Copenhagen Business School, hava gjørt.

Lærarar, ið ikki eru engageraðir og eru ófyrireikaðir, gerast skjótari strongdir. Við øðrum orðum troyttast engageraðir lærarar ikki, vísa kanningar hjá Udo Rauin. Mads Hermansen professari sigur víðari á somu síðu, at sterkastu lærararnir eru eldsálir, sum eisini hava eina realistiska mynd av avmarkingunum í tí, teir kunnu fremja í verki.

Hetta er kanska júst trupulleikin. Vit kenna omanfyri nevndu høgu krøv til hvønn einstakan lærara, og málið er sjálvsagt engageraðir lærarar, men hvør hevur eina realistiska mynd av, hvat ein fólkaskúlalærari er førur fyri at útinna í verki? Nú og tá væntar sjálvt lærarin hesi evni. Lærarin kann ikki bæði hava foreldraleiklut og lærаraleiklut. Hetta er ov høg og ómøguligkrøv. Markantar avmarkingar liggja eisini í uppgávuni at røkja 24 ymiskar næmingar í 45 minuttir, har allir skulu fáa væl burturúr. Bæði hugburðurin og skipanin sjálv mugu broytast, skal undirvísingin vera nøktandi bæði fyri lærara og næming.

Tað mugu vera fleiri enn lærararnir at lyfta byrina, ið skúlin er. Um vit vilja engagement, mugu vit gera tað møguligt og vert at engagera seg. Avgerandi er, at foreldur, og samfelag sum heild eru engagerað. Tí um alsamt vaksandi krøvini kennast sum kvørkratak á læraran, er avleiðingin sjálvsøgd og eyðsýnd.

# Keisaradreymar í sparitíðum

EDMUND JOENSEN
Løgtings- og fólkatingsmaður



Landsstýrið noktar at brúka fult útbygdu uttanríkistænastuna í Ríkisfelagsskapinum. Samstundis, sum høvuðsvinnan í landinum armast út, sjúkrahúsverkið liggur í andaneyð, og føroyingar skulu gjalda hægri skatt og avgjøld, hevur uttanríkisráðharrin hjá heimastýrinum boðað frá, at nýggjar "sendistovur" skulu stovnast í New York og Moskva. Tíðspunktið fyri einari dýrari víðkan av uttanríkistænastuni hjá heimastýrinum kundi neyvan verið verri, og nyttan av nýggju "sendistovunum" er sera ivasom

Nógvar uttanlandsferðir men onki úrslit.

So stutt kann uttanríkispolitikkurin hjá CHE-landsstýrinum lýsast, nú stívliga 100 dagar eru farnir av valskeiðnum.

**Úrslitaleyst Sirkus á Ferð**

Heimastýris-uttanríkisráðharrin hevur seinastu mánaðirnar ferðast í ymisk lond, har hann – sambært tíðindaskrivum úr heimastýris-uttanríkisráðnum – hevur styrkt bond millum Føroyar og ávís lond.

Harumframt hevur hann virkað fyri at fáa EFTA-lond at geva Føroyum limaskap í EFTA.

Higartil hava vit, sum umvegis skattin rinda fyri hesar mongu uttanlandsferðir, bert sæð hópin av myndum í fjølmiðlunum, har Høgni Hoydal heilsar uppá hendan og hin ráðharran ella embætismannin.

Skattaborgarin hevur tó onki frætt um, at nakað ítøkiligt er komið burtur úr nógvu ferðingini.

Bert uttanlandsferðir og føgur orð – onki úrslit.

**Nýggjar "sendistovur"**

Samstundis leggur CHE-landsstýrið dýrar ætlanir um at stovna nýggjar, føroyskar "sendistovur" í New York og Moskva.

Tey flestu vita, at komandi "sendistovurnar" fáa ikki tann stóra týdningin fyri Føroyar, tí tær fáa ikki diplomatstatus. Tí má roknast við, at tær kunnu ikki brúkast til tað stóra í alment góðkendum uttanríkispolitiskum samanheingi. Tí ber heldur ikki reiðiliga til at rokna hesar komandi "sendistovurnar" fyri veruligar sendistovur.

Kortini setur CHE-uttanríkisráðharrin uppá, at hann skal hava bonað gólv í øðrum londum at ganga á. Har kann Merkið hátíðarliga og undir tjóðsangi vindast á stong.

Her spøkir tann misskilta nationalisman aftur.

Tað hevur stóran týdning fyri CHE at seta føroysk stempul á ymiskt – t.d. á fíggjareftirlit, serumsorgan, revsirætt og sakføraravirksemi – hóast tað í veruleikanum ber í sær, at tey ymsu økini fella í órøkt.

**Hava fult útbygda uttanríkistænastu**

Eitt er, at vit hvørki síggja úrslit av ferðingini ella fáa nakað veruligt gagn av teimum nýggju sonevndu "sendistovunum".

Tað, sum veruliga vísir, at uttanríkispolitisku ætlanirnar hjá CHE eru burturvið, er, at Føroyar longu hava atgongd til eina fult útbygda uttanríkistænastu í Ríkisfelagsskapinum.

Henda uttanríkispolitiska tænasta hevur veruligar sendistovur ella konsulát við diplomatstatusi í flestu av teimum heimsins londum, ið Føroyar hava interessur í.

Høgni Hoydal kundi tó ikki droymt um at brúkt verandi uttanríkistænastu, hóast vit sum land í Ríkisfelagsskapinum hava atgongd til hana.

Nei, almenni CHE-politikkurin er, at vit skulu heldur brúka pengar at byggja upp eina misskilta nationalistiska uttanríkistænastu fyri hópin av pengum.

Hetta hendir – væl at merkja – í eini tíð, har høvuðsvinnan í landinum armast út, sjúkrahúsverkið liggur í andaneyð, og føroyingar skulu gjalda hægri skatt og avgjøld.

**Alternativið er gott**

Føroysku interessurnar á uttanríkisøkinum høvdu verið munandi betri røktar umvegis uttanríkistænastuna hjá Ríkisfelagsskapinum.

Høvuðsmálið eigur púra greitt at vera at fáa í lag eitt munandi tættari samband við Europasamveldið. Positiv tekin komu longu í februar frá einum ES-nevndarlimi um at fara í mennandi samrøður við ES. Í Sambandsflokkinum eru vit ikki í iva um, at málið eigur at vera føroyskur ES-limaskapur við undantøkum.

So leingi CHE-stýrið hevur valdið í landinum, verður henda skilagóða kós ikki løgd.

Keisaradreymarnir skulu jú útlivast, eisini í sparitíðum.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin